# Eiðis kvøldskúli

Um nóg nógv tekna seg, verður skipað fyri kvøldskúla í

| Lærugrein | Lærari | Telefon |
|---|---|---|
| Matgerð týskvøld kl. 19 | Katrin Højsted | 423465 |

Luttøkugjaldið, sum skal gjaldast fyrsta kvøldið, er kr. 100,-

Tekning fer fram hjá lærarunum í seinasta lagi fríggjadagin 8. februar 2002.

Undirvísingin er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning frá myndugleikunum.

**Eiðis kvøldskúli**
tlf. 423092 · fax 423480

# Frá Miðvágs kommunu

Søkt verður eftir einum **reingeringsfólki** til Miðvágs/Sandavágs skúla og einum til Gamla skúla at byrja sum skjótast.

Meira fæst at vita um størvini á kommunuskrivstovuni.

Umsóknir skulu verða kommununi í hendi seinast fríggjadagin 8. februar 2002.

**Miðvágs kommuna**

# 2 íbúðir í Havn til leigu

Við hesum verða 2 íbúðir í ognini Torfinsgøta 23 við hesum lýstar til leigu. Íbúðirnar eru uml. 50 m² til støddar við stovu, sovirúmi, entré, køki og baðirúmi. Mánaðarliga leigan er í løtuni ávíkavist kr. 3.000,- og 3.300,- íroknað hita, men uttan el. Limir í »Pensionskassen for Sygeplejersker« og sjúkrasystranæmingar hava framíhjárætt.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um navn, bústað, føðingardato og møguligum limaskapi í pensiónskassa, verður at senda undirritaða áðrenn 15. februar 2002.

Nærri upplýsingar annars, fáast við at venda sær til undirritaða.

**Annfinn V. Hansen, adv.**
Bryggjubakki 22, boks 106,
110 Tórshavn
tlf. 359595 · telefax 359596
T-postur: advokat@advokat.fo



**HITABLÁSARI**
Sera væl egnaður til frambygdar bátar.
Verður koplað inn í kølivatnið.
Fæst 12 ella 24 volt
D.J.ENNI
TVØROYRI
Tlf. 37 10 61

# Suðuroyingar

Útsølan byrjar fríggjadagin 1. feb. kl. 10.00. Sparið upp til 70%.

**Duett**
Ítrótta- og klædnahandil í Vági

# SKEIÐ Í ALING

Fiskivinnuskúlin skipar fyri skeiði fyri alarar, um sjúkur og sjúkufyribyrging á Hotel Føroyum tann 26. og 27. februar 2002. Pláss er fyri 20 luttakarum.

**Málbólkur:** Starvsfólk í alivinnuni.

**Fortreytir:** Tað er ein fyrimunur, um skeiðsluttakarar hava royndir innan aling, men tað er ongin treyt.

**Undirvísarar:** Jákup Andreassen, Peter S. Østergaard, Hørður Wardum og Gurðun Gudmundsen

**Skipan:** Skeiðini verða skipað sum vistarskeið á Hotel Føroyum í Havn

**Skeiðskostnaður:** Kr. 4.250 við gisting og kr. 4.000 uttan gisting (verður kravt inn undan skeiðnum)

**Undirvíst verður m.a. um:**
Mikroskopi, sjúkur og sjúkufyribyrging, flutningur av smolti/laksi og reinførið. Fullfíggjað skrá er at finna á heimasíðuni hjá Fiskivinnuskúlanum: www.fiskvest.fo

Seinasta freist fyri tilmelding er týsdagin **12. februar 2002**. Tilmelding fer fram við at senda ella faxa innskrivingarseðilin til Hotel Føroyar, við Oyggjarvegin, 100 Tórshavn. Telefax nummarið er 31 60 19. Til ber eisini at ringja til Hotel Føroyar tlf. 31 75 00 og boða frá luttøku. **Tilmeldingin er bindandi**. Skeiðini eru treytað av nóg stórari undirtøku.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96, 350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73, fax 42 44 28
T-postur: fiskvest@fiskvest.fo
www.fiskvest.fo

✂

**Innskrivingarseðil til skeið**

**við gisting** ☐

**uttan gisting** ☐

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./stað: | Tlf. heima: |
| Teldupostur | Gjaldari: |


Skótabúðin

**Jakkar, reyðir & gulir**
**verða seldir við -30% í avsláttri**
***Skótabelti eru aftur a fáa***

**Pinewood jakkar, buksir og regnsett í army grønum**




| | |
|---|---|
| Jakki | 718,- |
| Buksur | 560,- |
| Regnsett | 760,- |
| frá S til XXL | |

**Skótabúðin**
Hoydalsvegur 10 • Postboks 1089 • 110 Tórshavn • Tel. 317777




# Lærari søkist til Argja skúla

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara at byrja uml. 15. februar 2002 og skúlaárið út.

Starvið er tíðaravmarkað og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Lærugreinir: støddfrøði, danskt, kunningartøkni, náttúra og tøkni í miðdeildini. Landalæra í 9. flokki og Miðlabreyt. Møguleiki er fyri evt. broytingum.

Umsókn við møguligum prógvum skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 12. februar.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlan, tlf. 314136.

**Skúlastýrið fyri Argja skúla**
v/ Maritu Simonsen
Støðlagøta 15
Argir

# Mylnuhúsið søkir eftir 1 hjálparfólki

Søkt verður eftir einum hjálparfólki til Mylnuhúsið, at byrja 1. mars 2002.

Starvið er í útibarnagarðinum, 35 tímar um vikuna.

Mylnuhúsið er ein sjálvsognarstovnur frá 1999. Vit taka dagliga ímóti 99 børnum í aldrinum 0 - 9 ár. Í Mylnuhúsinum er pláss fyri at bæði børn og vaksin kunnu seta síni ***spor*** her, vit arbeiða í tí dagliga við okkara eygleiðingarevnum og eru upptikin av, hvat upptekur børnini, fyri síðan at leggja dagin til rættis út frá tí og leggja vit stóran dent á, at varða um øll børnini.

**Vit sóknast tí eftir hjálparfólki ið er:**
- fleksibul
- hevur opið sinni
- sær møguleikar fram um mørk
- tekur støði í barninum
- tekur barnið í álvara
- er opin fyri nýhugsan
- leggur stóran dent á gott samstarv við foreldur og samstarvsfelagar.

Lønar- og setunarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið, kommunurnar og Føroya Pedagogfelag.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran Hanna Thøgersen telefon 457788 ella varaleiðaran Annie Joensen telefon 217788.

Umsøknir til størvini, saman við upplýsing um útbúgving og royndir skulu verða okkum í hendi, seinasta lagi fríggjadagin 15. februar 2002.

**Mylnuhúsið**
Mylnugøta 10
700 Klaksvík

# Handilsmiðdepilin í Runavíkar Kommunu

## Handilsmiðdepilin í Runavík søkir samskipara

Søkt verður eftir fólki til Handilsmiðdepilin í Runavík. Starvið er eitt hálvdags starv og verður sett skjótast gjørligt.

**Starvið**
Tann, sum settur verður, kemur í høvuðsheitum at marknaðarføra Handilsmiðdepilin, sum er eitt samtak av 33 handlum í kommununi. Arbeiðið er sera sjálvstøðugt, men persónurin kemur tó at hava tætt samstarv við Kunningarstovuni í Saltangará. Arbeiðið fevnir um ymiskar uppgávur so sum:

- Marknaðarføring av Handilsmiðdeplinum
- Leggja ætlanir fyri árið, mánaðir osfr.
- Víðka um Handilsmiðdepilin, fáa fleiri handlar við
- Fyriskipan av tiltøkum og skeiðum
- Samstarv við handlarnar

**Førleikakrøv**
Útbúgving ella royndir innan marknaðarføring og grafiskt arbeiði er ein fyrimunur. Eisini verður dentur lagdur á, at viðkomandi hevur:

- áræði
- góð samstarvsevni
- gott hugflog
- evni til at arbeiða sjálvstøðugt & fleksibult
- EDV kunnleika á brúkarastøði

Løn sambært avtalu.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Eysturoyar Kunningarstovu, tlf. 449449

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til Handilsmiðdepilin innan 20. februar.

**Handilsmiðdepilin**
Boks 200
600 Saltangará
tlf. 449449

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# MÓTTØKA

Í sambandi við, at Kartni Jacobsen er settur sum sløkkiliðsstjóri, verður móttøka á **Brandstøðini** fríggjadagin 1. februar 2002, frá kl. 15.00 til 17.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

SNARSKIVAN

# Varaleiðari til í Dr. Jakobsensgøtu

Vit sóknast eftir varaleiðara at byrja 1. mars ella eftir nærri avtalu.

**Vit kunnu bjóða tær:**
… eitt spennandi starv, har tú fært høvi til at vísa tíni evnir og hugflog,
… ein handil, við góðum rakstri og nógvum spennandi møguleikum,
… eitt gott og lívligt arbeiðsumhvørvi,
… løn eftir avtalu og m.a. førleika.

**Vit vænta okkum av tær:**
… kanst hava ábyrgd av at handilin altíð er til reiðar at taka ímóti kundum,
… kanst standa á odda og menna starvsfólkaliðið í handlinum,
… kanst skipa fyri góðari kundarøkt,
… dámar at taka av avbjóðingum og hava nógv at gera,
… sjálvstøðug/ur, ábyrgdarfull/ur og kanst skifta millum arbeiðsuppgávurnar í handlinum,
… hevur kunnleika til handilsyrkið.

Meira fæst at vita um starvið, við at støkka inn á gólvið ella ringja á tlf. 311320 ella 217593 og spyrja eftir leiðaranum Bo Møller.

Umsókn skal vera okkum í hendi innan **9. februar 2002** og stílast til:

**FK-Tórshavn**
Att.: Bo Møller
Dr. Jakobsensgøta 6
Boks 349 · 110 Tórshavn

**Keypssamtøkan**
**Dr. Jakobsensgøta**

# Skrivstovunæmingur

Við hesum verður søkt eftir skrivstovunæmingi at byrja á skrivstovu okkara mánadagin 18. februar 2002.

Áhugaði verða biðin um at venda sær til skrivstovu okkara við skrivligari umsókn í seinasta lagi fríggjadagin 8. februar 2002.

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 • 100 Tórshavn
tlf. 311260 • fax 311261

# Tøkk

Øllum okkara mongu stuðlum, runt um landið, vilja vit á henda hátt senda ein hjartans tøkk, við ynskjum um eitt av Harranum signað nýár.

***Herberg Frelsunarhersins***